miðvikan

Nr. 76 • 22. apríl 2009

Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

## Julianna misti pápan við Neptun:

# Mamman fór í svørt klæði

**Í samband við hesa røð hava vit havt samrøður við fleiri av teimum, sum sótu eftir í hesum vanlukkum. Tað verður greitt frá, hvussu tey minnast hesa hending, og hvussu tey annars kláraðu seg seinni í lívinum. Tað kann sigast, at sum høvuðsreglu komu tey væl burtur úr tí. Í hesi grein er frásøgn hjá Julionnu f. Joensen, ættað úr Vestmanna**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*Neptun hevði júst fingið nýggjan motor*

**2. partur**

Julianna Samuelsen, sum er búsitandi í Havn, er ein av teimum, sum gjørdist faðirleys við Neptun. Pápi hennara var tann 40 ára gamli Julius Joensen, ættaður úr Útistovu í Hvalvík. Hann var giftur til Vestmanna við Súsannu Mariu, dóttir Margrethu og Grækaris Kristoffersen.

Julius hevur í hvussu er verið við Neptun í 1924. Hetta ár er hann avmyndaður inni á Siglufirði. Óla Jákup hevði keypt Neptun í 1923, so tað kann væl hugsast, at Julius hevur verið við alla tíðina.

Teir báðir vóru annars svágrar, Óla Jákup var nevniliga mammubeiggi Julionnu. Her var dupultur svágarskapur, tí Julius var beiggi konu Óla Jákup. Húsini vóru somuleiðis grannar.

Julianna er elst av systkjunum. Hon er í dag 82 ár, meðan beiggjarnir Hans og Gunnar eru 80 og 77 ár. Teir búgva framvegis í Vestmanna, Hans býr í barndómsheiminum.

Tískil hava syskini verið 7, 5 og 2 ára gomul, tá ið tey mistu pápan. Julianna var farin í skúla árið fyri, og hon minnist hetta rættuliga væl.

Pápin er farin avstað nakað seinni enn vanligu tíðina hetta várið. Tá ið skipini komu heim aftur í mai, og øll hini børnini fingu teirra pápar heim aftur, væntaðu tey sjálvsagt, at pápi teirra eisini fór at koma.

## Skipaboð, men eingin Neptun

Tað vóru jú nógv skip í Vestmanna, og tá ið eitt skip sást koma inn eftir, fóru børnini um alla bygdina og róptu “skipaboð.” So øll at hyggja, hvat skipið mundi vera hesa ferð. Tá ið skipið nærkaðist, sást eisini, hvat skipið var, og tá var frøði á teimum børnum, sum nú fingu pápan heim.

Tað kom skip eftir skip, men eingin Neptun. Einaferð tendraðist vónin tó eitt lítið bil. Tey sóu eitt skip við hvítari rond í erva. Hetta kundi verið Neptun, men táið skipið kom nærri, sást, at hetta var annað av vágaskipunum Elisabeth ella Docea. Vónbrotið var sjálvandi stórt.

Ein dag má bert staðfestast, at eingin Neptun kemur aftur. Tann mest ítøkiliga staðfestingin var, at presturin Grøn úr Kvívík kom á vitjan. Tey sótu øll inni í fínustovu, har prestur royndi at troysta sum frægast.

Nakað seinni var so minningargudstænasta í Vestmanna fyri manningarnar á Neptun og Nólsoy, har Jákup Dahl próstur talaði. Julianna minnist, at hon var í kirkju hendan dagin saman við beiggjunum og mammuni. Her vóru sjálvandi eisini hini, sum høvdu mist.



*Julius og Súsanna, foreldrini hjá Julionnu á yngri døgum*

## Mamman fór í svart

Tann fyrsta ítøkliga broytingin innandura var annars, at mamman fór í svart. Tað var vanligt hjá einkjum at fara í svørt klæði frá ovast til niðast, sjálvt sokkarnir vóru svartir. Hesum gingu tær í alla sína tíð, um tær ikki giftust aftur. Men mamma Julionnu giftist ikki aftur. Seinastu árini skifti hon kortini til blátt. Tað vóru nógvar konur, sum soleiðis komu at ganga í svørtum klæðum størra partin av lívinum. Hetta var eisini galdandi fyri mammu Julionnu. Hon gjørdist einkja um 40 ára aldur og bleiv 91 ár.

Ein onnur broyting var eisini, at nú fingu tey ikki longur íslandsber. Hetta var besta góðgæti, sum pápar kundu hava heim við sær úr Íslandi. Áðrenn teir fóru heim, fóru menninir niðan í hagan at fylla eitt blikk við berum at hava heim við sær til børnini.

Annars var tað soleiðis í Vestmanna, sum var tað vanliga undir slíkum umstøðum, at fólkið í bygdini hevði samhuga við tey, sum høvdu misti, og tey hjálptu teimum eisini tað, sum tey kundu.

Tað var tó ein stór broyting, at forsyrgjarin var burtur. Men tey kláraðu tað kortini. Í 1934 var tryggingin við slíkar vanlukkur ikki so galin. Mamman segði kortini, at tað var gott, at tey áttu húsini og ikki skyldaðu nakað í teimum.